

# Altjóða ráðstevna í Norðurlandahúsinum

**Altjóða ráðstevnan, TransAtlantic Climate Conference, sum verður í Norðurlandahúsinum 7. og 8. apríl snýr seg um altjóða avbjóðingarnar, sum standast av veðurlagsbroytingum. Hon setur fokus á mongu avbjóðingarnar hjá m.a. vinnuni í hesum sambandi.**

Á ráðstevnuni verður givið boð uppá, hvussu vit við nýggjari tøkni kunnu brúka minni orku, dálka minni og menna møguleikarnar innan vinnu, útbúgving og gransking.

Al Gore, sum vann friðarheiðursløn Nobels í fjør, verður høvuðsrøðari á altjóða ráðstevnuni.

Eisini føroyski havfrøðingurin, Bogi Hansen, sum herfyri vann norðurlendsku umhvørvisvirðislønina, fer at røða á ráðstevnuni saman við øðrum týðandi røddum í altjóða umhvørviskjakinum.
Føroyskar og útlendskar fyritøkur og einstaklingar fara at vísa á avbjóðingar og loysnir, sum eru tengdar at einum burðardyggum havumhvørvi.

---

**Atgongumerkjasølan byrjar fríggjadagin 29. februar kl. 9.00 á tel 309900. Frá fríggjadegnum kl. 16.00 fer øll atgongumerkjasølan fram á www.tacc2008.com. Kostnaðurin er kr. 6800.**

---

Bitland, Vinnuhúsið og Samvit skipa fyri ráðstevnuni. Føroya Banki og Eik Banki eru høvuðsstuðlar.

Lesið meira á www.tacc2008.com

## TransAtlantic Climate Conference

7- 8 apríl 2008 | Norðurlandahúsið | www.tacc2008.fo

Eik | FØROYABANKI | bitland enterprise | VINNUHÚSIÐ HOUSE OF INDUSTRY | SamVit